


*Jan Christiansen og Dánial P. Hansen sum undirskriva sáttmála um North Atlantic Fish Fair*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

North Atlantic Fish Fair:

# Setir Føroyar á heimskortið

**Fiskivinnustevnan, North Atlantic Fish Fair, sum nú á triðja sinni verður hildin í Føroyum, hevur megnað at markerað seg sum ein av teimum týðandi altjóða fiskivinnustevnunum. – Heldur enn at veksa væl meira um stevnuna, hava vit lagt okkum eftir at bøta um dygdina á henni, sigur Dánial Petur Hansen, sum 1. september í ár tók við sum stjóri í Atlantic Fair**

FISKIVINNUSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stóra altjóða fiskivinnustevnan, North Atlantic Fish Fair, sum tvær ferðir hevur verið hildin á havnaøkinum hjá Runavíkar Havn, verður nú aftur komandi ár. Stevnan, sum verður hildin annað hvørt ár, verður hesaferð hildin í høvuðsstaðnum – og ikki í Runavík sum undanfarnu árini. Henda triðja stevnan í røðini verður í døgunum 3.-5. mai, og karmurin um stevnuna verður stóra høllin hjá Poul Mohr á Sandvíkahjalla.

Stigtakarar til North Atlantic Fish Fair eru Áki í Skemmuni og Andrias Jacobsen, sum báðir búgva á Glyvrum. Teir eiga felagið, Atlantic Fair Spf, sum í 2001 fekk heiðurin sum ársins átak, eftir at stevnan á fyrsta sinni varð gjøgnumførd.

Dánial Petur Hansen (Piddi), ið eisini varð við til at samskipa North Atlantic Fish Fair fyrstu ferð, tók tann 1. september í ár við sum nýggjur stjóri í Atlantic Fair, og tekur hann sær nú av projektleiðsluni í samband við komandi fiskivinnustevnuna.

## Ikki í tjøldum

Dánial Petur sigur, at tey bæði árini, stevnan hevur verið hildin á økinum hjá Runavíkar Havn, hevur størsti parturin av framsýningini verið í stórum tjøldum. Haraftrat hava bygningarnir hjá P/F Skipafelagnum Føroyar og P/F Beta verið nýttir sum framsýningarøkið.

Dánial Petur sigur, at tað kann verða ein vansi við at hava eina so stóra framsýning í tjøldum, tí tá kunnu veður og vindur hava so stóran ávirkan á, hvussu tiltakið eydnast.

– Viðrar illa, og tað er kalt í veðrinum, eru tjøldini ikki væl egnaði til hetta endamál. Tað verður gjóstur inni og kalt, og stevnuumhvørvið verður ikki so hugnaligt, sum ynskiligt er.

Dánial Petur sigur, at framsýnarar í eftirmetingum hava víst á hesi viðurskifti, og nú tjøldini eisini eru vorðin dýrari at leiga, og báðir bygningarnir á økinum ikki høvdu verið tøkir til endamálið komandi ár, hevur felagið gjørt av at flyta tiltakið í høllina hjá Poul Mohr, sum teir halda er sera væl egnað til endamálið.

– Haraftrat kemur, at Smyril Line hevur boðað frá, at Norrøna ikki kann virka sum hotelskip v.m., sum hon hevur gjørt undanfarnu stevnur.

Hann vísir á, at framsýningarøkið hini árini hevur verið umleið 5.000 fermetrar stórt, og í høllini á Sandvíkarhjalla eru 5.000 fermetrar undir sama taki.

– At kalla øll framsýningin verður inni í hesum bygningi. Bátar, truckar, lemmar og kanska onkur motorur verða vístir fram á uttandura framsýningarøki við sjálva høllina, eins og vanligt er aðrastaðni, har slíkar framsýningar eru, sigur Dánial Petur.

Hann sigur, at dygdin á framsýningini verður nógv betur, nú alt tiltakið verður undir somu lon – og gott er, at sleppa undan í sama mun sum áður at hugsa um veðrið stevnudagarnar.

– Vit fara kortini at brúka tjøld til onnur endamál enn til sjálva framsýningina, eitt nú til forhøll og móttøku, sigur Dánial Petur.

## Stórur áhugi

Dánial Petur sigur, at áhugin fyri framsýningini er ikki minni hesaferð, enn hann hevur verið hinar báðar ferðirnar.

– Greitt er nú, at flest allar fyritøkur, ið hava luttikið á undanfarnu fiskivinnustevnunum her heima, verða við aftur hesaferð.

Hann sigur, at beinleiðis tilmeldingarnar eru nú so nógvar í tali, at tað ikki er óhugsandi, at fullteknað verður, áðrenn komið er langt inn í tað nýggja árið.

– Meira enn helmingurin av framsýningarøkinum er longu endaliga selt, og haraftrat er út við 20% av plássinum, sum eftir er, bílagt.

Av útlendskum framsýnarum eru tað serliga fyritøkur í okkara grannalondum, sum aftur hesaferð fara at bjóða seg fram, men talan er eisini um fyritøkur úr londum sum, Pólandi, Týsklandi, Spaniu, Hálandi og Kanada.

– Onkur framsýnari verður eisini úr øðrum uppaftur meira fjarskotnum londum, sigur Dánial Petur.

North Atlantic Fish Fair hevur megnað at markerað seg sum ein av teimum týðandi altjóða fiskivinnustevnunum, og Dánial Petur sigur, at tilmeldingar og fráboðanir higartil eisini benda á, at talið av útlendskum vitjandi hesaferð verður enn størri enn undanfarin ár.

– Vit hava hesaferð avgjørt at leggja okkum meira eftir at fáa vitjandi hendanvegin, sum kunnu taka avgerðir av týdningi fyri tær fyritøkur, ið bjóða seg fram á stevnuni, sigur hann.

Dánial Petur heldur, at við stívliga 300 framsýnarum og út við 11.000 vitjandi hevur fiskivinnustevnan møguliga nátt ta støðd, sum er hin rætta til eina slíka stevnu í Føroyum.

– Tað er mark fyri, hvussu stór ein slík stevna í Føroyum kann verða, tí hetta avhongur bæði av framsýningarøkinum og teimum fasilitetum, sum eru í Føroyum at hýsa fólki. Heldur enn at veksa munandi um stevnuna, hava vit lagt okkum eftir at bøta um dygdina á henni, sigur hann.

Tey, sum sponsorera North Atlantic Fish Fair hesaferð, eru Skipafelagið Føroyar, ið hevur verið við sum sponsor allar tríggjar ferðirnar, Føroya Banki, sum er við fyri aðru ferð, Atlantic Airways og Tórshavnar kommuna.

Tað er dóttirfelagið hjá Atlantic Airways, Green Gate Incoming, sum syrgir fyri ferðum og uppihaldi í samband við fiskivinnustevnuna.

## Á heimskortið

Eingin ivi er um, at dagarnir, stevnan verður hildin á Hjalla, bæði á ein og annan hátt fara at merkjast í høvuðsstaðnum.

– Hetta er størsta einstaka tiltak, sum verður fyriskipað í Føroyum, og tí kemur Tórshavnar kommuna, sum nú fer at hýsa hesum tiltaki – og harvið eisini Føroyar sum land - á heimskortið í fiskivinnuhøpi, væntar borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen.

Hann heldur, at kommunan eigur at nýta henda møguleika at "bjóða seg fram", sum hann tekur til.

– Ein slík fiskivinnustevna fer eisini at hava stóran týdning fyri tænastuveitarar av ymiskum slagi, eitt nú flogfeløg, ferðaskrivstovur, hotellir, matstovur – og sjálvt fyri hýruvognsførararnar, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Herfyri skrivaðu, Jan Christiansen borgarstjóri í Tórshavn, og Dánial Petur Hansen, stjóri í Atlantic Fair, undir samstarvsavtaluna í samband við stóru altjóða fiskivinnustevnuna, sum verður hildin í døgunum 3.-5. mai 2005.










